### Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 21 | 13 - 5 - 3 | 50 | 17 | 33 | 44 |
| 2 | FCK (M) | 21 | 10 - 7 - 4 | 32 | 18 | 14 | 37 |
| 3 | AaB | 20 | 10 - 4 - 6 | 30 | 28 | 2 | 34 |
| 4 | Esbjerg | 20 | 10 - 3 - 7 | 34 | 27 | 7 | 33 |
| 5 | AB | 19 | 8 - 8 - 3 | 31 | 20 | 11 | 32 |
| 6 | OB | 21 | 8 - 8 - 5 | 35 | 32 | 3 | 32 |
| 7 | FCM | 20 | 7 - 8 - 5 | 27 | 18 | 9 | 29 |
| 8 | Viborg | 21 | 5 - 9 - 7 | 25 | 27 | -2 | 24 |
| 9 | Vejle | 21 | 5 - 4 - 12 | 28 | 54 | -26 | 19 |
| 10 | AGF | 21 | 4 - 6 - 11 | 26 | 36 | -10 | 18 |
| 11 | Silkeborg | 20 | 4 - 4 - 12 | 18 | 30 | -12 | 16 |
| 12 | Lyngby | 21 | 2 - 8 - 11 | 20 | 49 | -29 | 14 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

### Hollendska toto-deildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 26 | 17 - 7 - 2 | 63 | 21 | 42 | 58 |
| 2 | FC Zwolle + | 26 | 16 - 6 - 4 | 46 | 27 | 19 | 54 |
| 3 | RBC Roo'daal | 26 | 16 - 5 - 5 | 59 | 30 | 29 | 53 |
| 4 | ADO Den Haag | 25 | 13 - 6 - 6 | 39 | 24 | 15 | 45 |
| 5 | Emmen | 25 | 13 - 6 - 6 | 40 | 28 | 12 | 45 |
| 6 | Cambuur/L. + | 26 | 11 - 6 - 9 | 37 | 30 | 7 | 39 |
| 7 | FC Volendam | 26 | 10 - 6 - 10 | 48 | 40 | 8 | 36 |
| 8 | BV Veendam | 24 | 10 - 6 - 8 | 38 | 36 | 2 | 36 |
| 9 | Storm/Telstar | 26 | 9 - 8 - 9 | 40 | 32 | 8 | 35 |
| 10 | Heracles A. | 26 | 10 - 4 - 12 | 40 | 43 | -3 | 34 |
| 11 | Haarlem | 25 | 9 - 6 - 10 | 30 | 32 | -2 | 33 |
| 12 | Dordrecht '90 | 25 | 8 - 7 - 10 | 44 | 44 | 0 | 31 |
| 13 | Helmond Sp. | 26 | 7 - 9 - 10 | 28 | 40 | -12 | 30 |
| 14 | G.A. Eagles | 26 | 7 - 8 - 11 | 35 | 44 | -9 | 29 |
| 15 | VVV | 26 | 9 - 2 - 15 | 41 | 55 | -14 | 29 |
| 16 | MVV | 26 | 5 - 6 - 15 | 33 | 50 | -17 | 21 |
| 17 | Eindhoven | 26 | 4 - 6 - 16 | 36 | 64 | -28 | 18 |
| 18 | Top/Oss | 26 | 3 - 4 - 19 | 19 | 76 | -57 | 13 |

Perioduvinnararnir eru merktir »+«

Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

### Enska 3. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 37 | 24 - 8 - 5 | 55 | 25 | 30 | 80 |
| 2 | Luton | 38 | 23 - 6 - 9 | 73 | 44 | 29 | 75 |
| 3 | Mansfield | 37 | 21 - 6 - 10 | 61 | 43 | 18 | 69 |
| 4 | Scunthorpe | 39 | 17 - 12 - 10 | 68 | 48 | 20 | 63 |
| 5 | Rochdale | 37 | 17 - 12 - 8 | 51 | 40 | 11 | 63 |
| 6 | Cheltenham | 35 | 16 - 13 - 6 | 55 | 37 | 18 | 61 |
| 7 | Shrewsbury | 39 | 17 - 9 - 13 | 57 | 44 | 13 | 60 |
| 8 | Hull C. | 38 | 16 - 10 - 12 | 52 | 38 | 14 | 58 |
| 9 | R&D | 39 | 15 - 12 - 12 | 50 | 47 | 3 | 57 |
| 10 | Kidderm. | 37 | 16 - 8 - 13 | 48 | 39 | 9 | 56 |
| 11 | Hartlepool | 38 | 14 - 10 - 14 | 57 | 44 | 13 | 52 |
| 12 | Southend | 38 | 12 - 11 - 15 | 44 | 47 | -3 | 47 |
| 13 | Macclesfield | 39 | 12 - 11 - 16 | 34 | 45 | -11 | 47 |
| 14 | Exeter | 37 | 13 - 8 - 16 | 41 | 60 | -19 | 47 |
| 15 | Swansea | 39 | 12 - 10 - 17 | 47 | 60 | -13 | 46 |
| 16 | Oxford Utd. | 39 | 10 - 13 - 16 | 48 | 52 | -4 | 43 |
| 17 | Darlington | 38 | 11 - 10 - 17 | 47 | 59 | -12 | 43 |
| 18 | Carlisle | 35 | 10 - 12 - 13 | 41 | 42 | -1 | 42 |
| 19 | Lincoln C. | 37 | 10 - 12 - 15 | 39 | 51 | -12 | 42 |
| 20 | Bristol R. | 37 | 10 - 9 - 18 | 36 | 47 | -11 | 39 |
| 21 | Leyton O. | 37 | 10 - 9 - 18 | 48 | 62 | -14 | 39 |
| 22 | Torquay | 39 | 9 - 12 - 18 | 36 | 57 | -21 | 39 |
| 23 | York | 35 | 10 - 8 - 17 | 40 | 60 | -20 | 38 |
| 24 | Halifax | 38 | 5 - 11 - 22 | 26 | 63 | -37 | 26 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

# FCK tekur seg nærri Børndby

**Annað vikuskiftið á rað kiksaði oddaliðið, sum tykist so mikið lítið sannførandi, at tað væl kann hugsast, at teir fara at missa fleiri stig**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Munurin millum Brøndby, sum frá kappingarbyrjan í juli og til vetrarsteðgin fyrst í desember var sannførandi oddalið, og til FCK á næstfremsta plássinum, minkar støðugt.

Sunnudagin vann FCK trý stig í Vejle. Samstundis megnaði Brøndby ikki meiri enn 2–2 á heimavølli. Harvið minkaði munurin millum tey bæði fremstu liðini annað vikuskiftið á rað. Tá tað næstsíðsta sunnudag var farið undir seinna partin av kappingini, var Brøndby níggju stig frammanfyri FCK. Í fyrsta umfarinum fekk FCK eitt stig, meðan Brøndby einki fekk. Hesa ferð fekk FCK trý stig, meðan Brøndby bara fekk eitt.

Brøndby hevði allar møguleikar at vinna á Viborg. Men tað var um reppið, at gestirnir fóru avstað við øllum. Viborg misti í 2. hálvleiki ein mann. Brøndby fekk brotsspark og skoraði, og dómarin hevði ostaskorpuna á lofti, tí hann helt verjumannin hava nýtt neyðbremsuna.

Hóast teir vóru undirmannaðir, so megnaðu teir í Viborg at leggja seg frammum aftur 2–1 – teir høvdu eisini verið frammanfyri 1–0 – og tá vanliga leiktíðin var farin, vísti máltalvan framvegis 1–2. Dómarin legði fimm minuttir afturat 2. hálvleiki. Sekundvísarin var næstan komin fimtu ferðina runt, tá tað eftir innlegg úr vinstru eydnaðist at stýra bóltin í málið.

Hóast munurin er sjey stig, so siga teir í FCK seg rokna við, at tað kann bera til at fáa Brøndby aftur. Avrikini hjá Brøndby hava verið so mikið lítið sannførandi, at tað væl kann hugsast, at teir kunnu missa fleiri stig. Í næstsíðsta umfarinum, sum verður spælt sunnudagin 12. mai, skal Brøndby spæla ímóti FCK. Dysturin verður í Parkini, og tað er ikki heilt óhugsandi, at talan verður um eina sanna finalu um DM!

Kappingin um DM kann gerast uppaftur meiri spennandi enn so. Undan vikuskiftinum var AaB javnt við FCK á næstfremsta plássinum. Í gjárkvøldið skuldu teir spæla á heimavølli ímóti AB.

## Esbjerg og OB væl við

Fýra tey lægst staddu liðini í superliguni taptu øll. Lyngby, sum í 1. hálvleiki næstsíðsta sunnudag ímóti Vejle sprellaði eitt sindur á heimavølli, hevði einki at siga í Esbjerg. Heimaliðið vann 5–0. Lyngby er aftast, og Esbjerg, sum komandi sunnudag skal spæla í Parkini ímóti FCK, er við í stríðnum um heiðursmerkini.

OB vann næstsíðsta sunnudag 4–3 ímóti Brøndby. Sunnudagin vóru teir í Århus, og tað gekk aftur hesa ferð sum eftir ánni. Illa stadda heimaliðið hevði einki vápn ímóti vandamikla Kasper Dalgas, sum skoraði øll trý OB málini og harvið gjørdist nýggjur toppskjútti í superliguni. OB vann 3–1.

FCM hevði vitjan av Silkeborg. Dysturin var vánaligur, men einasta málið, sum heimaliðið fekk í 2. hálvleiki, var fínt. Talan var um eitt fríspark úr 22 metrum, sum varð sent omanfyri verjugarðin og dygst inn undir samankomingina. Í kapping við málið hjá Toda Jónsson varð FCM sigursmálið valt til dagsins mál.

# Todi á veg móti toppinum

**Todi skoraði eitt fínt mál í Vejle, og avrikið bar boð um, at føroyski álopsmaðurin er sjálvskrivaður í FCK álopinum saman við Zuma**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Heystið var troystarleyst hjá Toda Jónsson. Skaði omaná skaða høvdu við sær, at hann so at siga ikki spældi á besta liðnum, og hjá FCK gekk tað einki serligt.

Nú er vent í holuni. Sunnudagin var FCK í Vejle. FCK vann 3–1. Svenski FCK venjarin, Hans Backe, hevði enn eina ferð valt Toda Jónsson í annan álopssessin. Makkarin hjá Toda var suðurafrikanski Zuma. Samstarvið teirra millum var gott í 2. hálvleiki. Teir skoraðu hvør sítt mál, og tað er eingin ivi um, at venjarin ætlar teir báðar at vera parið, sum skal hótta mótstøðumálini tað, sum er eftir at hesum kappingarárinum.



*Todi Jónsson er aftur í FCK-álopinum. Sunnudagin var hann maðurin aftan fyri eitt sera vakurt mál móti felagnum hjá Christian Høgna Jacobsen, Vejle*

## Kvøkkurin

Tað var møguleiki fyri, at bæði Vejle og FCK skuldu hava føroyingar í álopinum. Men soleiðis var tað ikki. Christian Høgni Jacobsen var ikki millum teir fyrstu ellivu hjá Vejle, og hann var heldur ikki millum skiftisspælararnar, sum komu á vøllin.

Todi Jónsson var frá byrjan í FCK álopinum saman við Zuma. Í 1. hálvleiki gekk einki serligt. FCK var lítið sannførandi. Teir megnaðu ikki at prógva, at teir eru flokkar omanfyri Vejle. Í staðin var tað Vejle, sum var á odda 1–0, tá fyrra umfarið var liðugt.

FCK málverjin, Magnus Kihlstedt, hevur ongantíð verið støðugur, og tað var hann heldur ikki sunnudagin. Tá tríggir minuttir vóru farnir, royndi Alex Nørlund hjá Vejle seg úr 28 metrum. FCK málverjin sá bóltin allan vegin, men kortini misti hann bóltin afturum seg og í málið.

## Todi í brennideplinum

Eftir steðgin setti FCK meiri ferð á, og so sást týðuliga, at teir eiga eitt lið, sum er mannað av fulltíðar yrkisspælarum, meðan Vejle hevur manning, sum ikki hevur so góðar umstøður.

Christian Poulsen og norski Erik Mykland settu seg á sentrala miðvøllin, og í álopinum vóru Todi og Zuma vandamiklir. Zuma javnaði til 1–1, tá seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt. Hann var fyrstur á returi, eftir at langskot hevði tikið stólpan. Minuttin seinni skoraði Todi eitt fínt mál. Zuma sneiddi seg hegnisliga leysan í høgru, og Todi legði seg eitt sindur afturá, áðrenn hann við høvdinum stýrdi bólinum dygst inn við handara stólpanum.

Eina lítla løtu seinni var um reppið, at Todi aftur var upp á spæl. Millum tveir verjuspælarar tamdi hann við bringuni høgt innlegg úr høgru, men hann gleið á váta vøllinum, tá hann ætlaði at renna seg leysan.

Christian Poulsen staðfesti kærkomna FCK sigurin, tá hann fimm minuttir undan dystarenda sendi fríspark beinleiðis í málið. Fimm minuttir framman undan var Todi Jónsson farin av vøllinum. Hann bar um at verða skiftur út. Í staðin fyri hann kom Peter Møller á vøllin. Hann fekk risa møguleika at skora, men hann kiksaði úr stuttari fjarstøðu.



# Gullið fór til Vestmanna



*Tað gjørdust vestmenningar og John Rødgaard, sum gjørdust føroyameistarar, eftir at teir vunnu trygt í umdystinum móti klaksvíkingum*



*Ólavur Simonsen og hinir úr Klaksvík høvdu annars allar møguleikarnar, men í seinasta umfarinum tveittu teir mest sum alt fyri borð, og góvu vestmenningum møguleikan fyri umdysti*

**Ikki bert í hondbólti eru vestmenningar ráðandi, eisini í talvi vunnu teir FM eftir umdyst móti klaksvíkingum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eftir eitt langt og spennandi kappingarár, bleiv úrslitið í sjálvari FM-lðikappingini í 1. deild, at tvey lið endaðu jøvn á fyrsta plássi, klaksvíkingar og vestmenningar. Umdystur bleiv tí neyðugur. Hesin var avgreiddur leygardagin í Kommunuskúlaauluni Havnini. Fitt av fólki fylgdu við gongdini í hesum serliga gullumdysti.

## Greiður óvæntaður sigur

Undan gullumdystinum vórðu klaksvíkingar mettir sum favorittar. Serliga á aftaru borðunum bleiv væntað at klaksvíkingar fóru at gera sær dælt, meðan Ólavur Simonsen og Rani Nolsøe á ovastu borðunum høvdu tyngri uppgávur móti ávíkavist IM John Rødgaard og Torbjørn Thomsen.

VT — KTF 3-1
IM John Rødgaard — Ólavur Simonsen 1-0
Torbjørn Thomsen — Rani Nolsøe 0-1
John Jacobsen — Steintór Rasmussen 1-0
Kári Durhuus — Tummas M. Anthoniussen 1-0

Tað varð tó júst aftaru borðini sum avgjørdi dystin. John og Kári vóru kanska meiri uppsettir, tí teir telvaðu væl og vunnu uppiborið teirra talv móti Steintóri og Tummasi Martin, sum annars hava havt eitt sera væleydnað kappingarár. Báðir vóru ósigraðir undan dystinum.

Bæði Steintór og Tummas Martin høvdu góðar støður í byrjanarspælinum, men í miðspælinum komu John og Kári fyri seg og vunnu at kalla trygt.

Trupulleikin í fjør hjá vestmenningum, var at aftaru borðini vóru ov óstøðug. Í ár hava teir vera sera støðugir og júst hetta hevur avgjørt FM-heitið í ár.

## Mundi tapt uppá tíð

Talvið millum John Rødgaard og Ólavur á fyrsta borði bleiv sera dramatiskt tað einu løtuna. Rødgaard hevði betri støðu, og hevði hampuliga góða tíð. Men við eitt brúkti hann nógva tíð uppá tann eina leikin, og hevði bert eitt sekund at leika síðsta leikin innan fyrstu fjøruti leikirnar. Hetta kláraði Rødgaard í evstu løtu, og fekk hann tá ein tíma til tjúgu leikir at avgreiða fyrimunin. Og hetta megnaði hann.

Einasti á vestmannaliðnum sum tapti varð Torbjørn Thomsen. Hann hitti Rana Nolsøe, og mangan hava teir sitið við áhugaverdum støðum. Ringt var framanundan at meta um hetta úrslit. Rani hevur ikki havt eitt gott kappingarár, og ætlaði hann tí at enda kappingarárið við manér, meðan Torbjørn hevur telvað hampuligt hendan veturin og er altíð støðugur.

Tað skuldi tó vísa seg at Rani telvaði væl, og vann eitt snøgt talv, har Torbjørn ongantíð kom rættiliga inn í talvið.

3-1 til Vestmanna Talvfelag, og eru sostatt føroyameistarar 2001/2002. Hjartaliga tillukku við tí!

Seinast vestmenningar vunnu FM var heilt afturi í 1992 (Tá mannaðu eitt nú John Rødgaard, John Jacobsen, Petur Højgaard og Niels O. Durhuus liðið) og kenna vit teir rætt, so ætla teir sanniliga ikki at bíða heili 10 ár til næsta FM-heitið.

Spurningurin er nú um vestmenningar eisini koma at eiga einstaklingaføroyameistaran í ár. FM verður sum kunnugt í Sandavági, og føroyameistarin John Rødgaard ætlar sær at endurvinna heitið frá í fjør. Sí www.faroechess.com viðvíkjandi tekning til FM.

Til ber enn at tekna lið til ungdóms- og barnakappingina sum verður leygardagin í Gøtu, við at venda seg til Reinhold Isaksen á reinhold@post.olivant.fo, ella telefon: 44 17 53 / 26 10 06. Seinasta freist at tekna seg er í kvøld, týskvøldið kl 21.00.

## Enn ein kappingarsigur

Heimsins besti telvari í løtuni, Garry Kasparov, vann sína 10. kapping á rað, tá hann sigraði frammanfyri Ponomariov, Adams, Ivanchuk, Anand, Vallejo og Shirov í Linares. Kasparov vann fýra talv, og leikti heili átta javnleikir í hesari dupultkapping. Undan næstseinasta talvinum, var Ponomariov við hansara lið, men Kasparov vísti ungu leyvini at enn kann eingin taka seg framum seg, og vann hann eitt sera flott talv móti Ponomariov. Ì seinasta umfarinum hevði javnleikur verið nóg mikið hjá Kasparov, men hann vildi meira og vann eitt skjótt talv við svarta fólkinum móti Shirov.

Ponomariov sum í okt. 2000 leikti í Føroyum í 3rd Tórshavn International, hevur nú av álvara bitið seg fastan í heimselituni við hesum úrslitið.

## Endaliga støðan

| | |
|---|---|
| Kasparov | 8 / 12 |
| Ponom. | 6,5 |
| Ivanchuk | 6 |
| Anand | 6 |
| Adams | 6 |

# Talvið hesa vikuna

**Rani Nolsøe (2185) — Torbjørn Thomsen (2210)**
**FM umdystur, 2. borð, 09.03.2002**

**Caro-Kann byrjanin**
1.e4 c6 2.d4 d5 3.Ric3 dxe4 4.Rixe4 Bf5 (Torbjørn leikar oftani hetta frábrigd) 5.Rig3 Bg6 6.h4 h6 7.Rif3 Rid7 8.h5 Bh7 9.Bd3 Bxd3 10.Fxd3 Rigf6 11.Bd2 e6 12.0-0-0 Fc7 13.Rie4 Rixe4 14.Fxe4 Rif6 15.Fe2 Bd6 16.g3 (svartur stendur eitt petti kroystur, men kortini er enn nøkunlunda javnvágur í) 16...0-0-0 17.c4 Fe7 (heldur ivasamur leikur. Men ikki er lætt hjá svørtum at finna rætta leikin) 18.Rie5 Rid7 19.f4 Rixe5 20.dxe5 Bc5 21.Bc3 Rxd1+ 22.Rxd1 Rd8 23.Fg4 Rxd1+ 24.Kxd1 (Uppbýti gevur hvítan betri endatalv) Fd7+ 25.Kc2 Bf8 (hvítur hevur ætlanir um f4-f5 gjøgnumbrotið, sum eisini tykist at vera eitt gott hugskot) 26.Ff3 c5? (svartur fer her nakað nógv eftir javnleikinum. ætlar at lukka støðuna, men svarti bispurin er nú púra burtur úr leikinum) 27.b3 Fc6 28.Fxc6+ bxc6 29.Kd3 g6 30.g4 gxh5 31.gxh5 Kb7 32.Be1 Be7 33.Ke4 Kb6 34.Bd2 Ka6 35.f5! Bf8 36.f6! (og svarti bispurin er læstur inni. Rani finnur nú røttu planina, nevnliga at flyta kongin yvir í hitt borði, og spakuliga leika seg til sigurs) 36...Kb6 37.Be3 Ka5 38.Kd3 Kb6 39.Kc2 Ka6 40.Kb2 Kb6 41.Ka3 Ka6 42.Ka4 Kb6 43.Bd2 Ka6 44.Ba5! Kb7 45.a3 Kb8 46.Bd2! (og nú finnur hvíti kongurin rætta pláss og gjøgnumveg) 46...Kc7 47.Ka5 Kb7 48.Be3 a6 (svartur kann ikki gera meir enn hann júst ger. Allir leikir eru tvangsleikir, teir einastu) 49.Bf2 Ka7 50.b4 Kb7 51.Be3 Ka7 52.a4 Kb7 53.b5! axb5 54.axb5 cxb5 55.Kxb5 Kc8 56.Kc6 [56.Bxc5 vinnur sjálvsagt eisini, men Kc6 er tann snøggasti leikurin í støðuni] 56...Kd8 57.Bd2 og Torbjørn gavst. Ke8 verður svarað við Kc7, og svartur missur bispin, meðan Kc8 verður svarð við Ba5! Sum gevur hvíta konginum fría atgongd) 1-0



Endastøðan, eftir 57. Bd2